## Gott tilhald í 20 ár

11. oktober var ein stórur dagur hjá pensjónistum og øðrum í Klaksvíkar kommunu. Henda dagin lat nevniliga upp eitt serligt tilhald fyri henda aldursbólkin við heitinum »Tilhaldið Sóljan«, hvørs endamál var at koma saman til eina hugnaliga samveru í hugnaligum umhvørvi. Hósdagin í komandi viku – sum er 20 ára dagurin fyri byrjanini - er ætlanin at hátíðarhalda dagin í Skálanum í Klaksvík.



## Viðingar neyvan tunnil í bræði

Borgarstjórin á Viðareiði, Árni Absalonsen óttast fyri, at tunlarnir norður um Fjall verða útsettir, tí peningur er bert settur av til framhaldandi prosjektering av tunlunum á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2008. 1,5 millión krónur er sett av til framhaldandi prosjektering av tunlunum norður um Fjall. Við útvarið hjá Kringvarpinum sigur hann seg vera vónbrotin av, at bert peningur til prosjektering er settur av til tunlarnar, og vísir á, at farleiðin norður til Viðareiðis er vánalig, tí tunlarnir eru myrkir og treingir, og ferðslan økist. Tunlarnir á Borðoynni vórðu gjørdir frá 1965 til 67, og eru tilsamans 3,8 kilometrar langir.

# Vatnkríggj ímillum Tvøroyri og Landsverk

**Fyri at fáa eina reaktión, gjørdi Tvøroyrar Býráð av at skrúva kranan fyri, so at Smyril ikki slapp at bunkra vatn við bryggjuna á Trongisvágsfirði**

ÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tvøroyrar býráð hótti við at skrúva kranan til ferjuleguna á Krambatanga fyri, tí Landsverk vil ikki betala. So hevði ikki bara Smyril mist vatnið, men eisini farstøðin og farmahøllin og so høvdu tey verið noydd at stongt*

Tvøroyrar Kommuna og teir myndugleikar í Havn, sum hava við siglingina hjá Smyrli at gera, svinga ikki serliga væl í takt.

Og støðan er nú so spent ímillum, at nú bendir alt á, at tað verður rætturin, sum má taka støðu til tvey trætumál ímillum Tvøroyrar Býráð øðrumegin og Strandferðsluna og Landsverk hinumegin.

Tað eru pengar, sum Tvøroyrar Býráð og Strandferðslan og Landsverk eru ósamd um.

### Vatnkríggj

Tað seinasta er, at Tvøroyrar Býráð og Landsverk eru endað í einum rættiligum vatnkríggi.

Tvøroyrar Býráð góðtekur ikki, at Smyril bunkrar vatn á Tvøroyri, uttan at betala fyri tað.

- Tað kann ikki vera meiningin, at Smyril skal vera einasta skip, sum kemur til bryggju í Føroyum, sum ikki vil betala fyri vatnið, sigur borgarstjórin á Tvøroyri.

Tað er Landsverk, sum hevur ábyrgdina av havnalagnum á Krambatanga og býráðið hevur givið Landsverki loyvi til at binda í kommunalu vatnveitingina, so at havnalagið og Smyril kunnu fáa vatn.

- Vit hava onki ímóti, at Smyril fær vatn, men Landsverk skal betala fyri tað, sigur borgarstjórin.

Men eisini Landsverk heldur upp á sítt og herfyri kom tað hartil, at Tvøroyrar Býráð hótti við at skrúva kranan fyri, so at Smyril ikki fekk meiri vatn.

- Tað var einasti máti fyri at tvingað tey at reagera, sigur Kristin Michelsen.

Men Landsverk svaraði kontant aftur og legði málið fyri rættin og har fekk Tvøroyrar Býráð fútaforboð ímóti at skrúva kranan oman á Krambatanga fyri.

Men eitt fútaforboð er bara fyribils og fyri at fáa eina endaliga avgerð, skal Landsverk leggja málið fyri rættin og tað gjørdi stovnurin í farnu viku.

Í løtuni heldur Tvøroyrar Býráð seg eiga 150.000 krónur til góðar hjá Landsverki fyri vatn. Tilsamans er talan um góðar 4.000 krónur um mánaðin.

### Vilja ikki betala fyri fjørðin

Men hetta er ikki einasta ósemja ímillum Tvøroyrar Býráð og myndugleikarnar í Havn.

Kommunan og Strandferðslan eru nevniliga eisini ósamd um, antin Smyril skal betala havnagjald ella ikki og hvør partur stendur við sítt.

Hesi seinastu árini hevur Tvøroyrar Býráð sent Strandferðsluni eina rokning fyri og aðra eftir við jøvnum millumbili fyri havnagjald, men Strandferðslan noktar blankt at betala.

Og nú er talan um milliónaupphædd, sum partarnir eru ósamdir um og fyribils eru so vánalig útlit fyri semju, at alt bendir á, at tað eisini verður rætturin, sum verður noyddur at skera ígjøgnum í hesum máli.

-Strandferðslan staðfestir, at tað er landið, sum eigur samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði og tí tvíheldur hon um, at hon eigur ikki at betala havnagjald fyri Smyril fyri at liggja á Trongisvági, sigur Kristin Michelsen.

Men her er Tvøroyrar Býráð ósamt, tí býráðið sigur, at innanfyri havnamerkini eiga øll skip at betala havnagjald, eisini Smyril.

- Vit halda ikki, at hetta hevur nakað sum helst at gera við, hvør eigur sjálvan bryggjukantin, tí innanfyri havnamerki, eiga øll skip at betala, eisini Smyril.

Borgarstjórin sigur, at skuldi Smyril betalt fult havnagjald, var talan um einar 6.000 krónur um dagin, men hann sigur, at býráðið er sinnað at tosað um eina avsláttarskipan, av tí, at Smyril brúkar havnina so nógv, men í øllum førum er talan um milliónaupphædd, sum liggur í klemmu.

- Men Strandferðslan er hvørki at høgga ella stinga í og støðan er nú tann, at málið er á veg í rættin til støðutakan.

Nakað síðani vóru Tvøroyrar Býráð og Strandferðslan bæði í Føroya Rætti og Landsrættinum, eftir at Strandferðslan ikki vildi góðtaka, at Tvøroyrar Býráð hækkaði havnagjaldið hjá Smyrli á gomlu havnina á Drelnesi, men tað málið tapti kommunan.

*Sí viðmerkingar frá Landsverki og Regini Vágadal á síðu 10.*

# Ongin trupulleiki at fáa nýggjar skiparar til Smyril

**Strandferðslan hevur fingið 13 umsóknir um at gerast skipari á Smyrli eftir at báðir skipararnir leggja frá sær við árslok fyri aldur**

UMSÓKNIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er gravgangur eftir at gerast skipari umborð á Smyrli.

Tað má Strandferðslan ásanna, nú hon hevur søkt eftir tveimum skiparum til flaggskipið, eftir at báðir teir royndu skipararnir leggja frá sær seinni í ár.

Umsóknarfreistin var úti í gjár og nú talt verður upp, hevur Strandferðslan fingið heilar 13 umsóknir um at yvirtaka brúnna á teirra største skipi.

Regin Vágadal, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at talan er um væl skikkaðar umsóknir, so í hesum føri sleppur Strandferðslan við vissu undan einum trupulleika, hon av og á hevur drigist við í summar og tað er at endurlýsa størv, tí ov fáir umsøkjarar eru.

Hann vónar at kunna fara undir starvsfólkasamrøður um einar 14 dagar og so verða størvini sett skjótast gjørligt.

Ætlanin er, at báðir teir nýggju skipararnir skulu byrja fyrst í novembur, ella eftir nærri avtalu.

Skipararnir sleppa at seta síni fingramerki á tænastustøðið umborð, og fara sostatt at fáa ávirkan á, at Strandferðslan fær eitt jaligt umdømi, tá talan er um tænastu.

Skipararnir skulu eisini hava góð búskaparlig og analytisk evnir, góð leiðsluog samstarvsevni, men teir skulu eisini vera miðvísir, duga at arbeiða við teldu og vera væl fyri í føroyskum og í enskum.

Men Strandferðslan vil eisini hava skiparar við drúgvum royndum, umframt at teir skulu vera uppfinningarsamir, nýhugsandi, róligir, upplýsandi og duga væl við starvsfólki og ferðafólki.